## Genbroyttar matvørur einasta loysn



Vinnuhúsið skrivar á sínari heimasíðu, at genbroyttar matvørur vaksa alsamt í tali, og at Evropa sleppur í framtíðini ikki undan hesum fyribrygdinum. Tað eru vantandi 9 milliardir menniskju á jørðini í ár 2050, og tí verður alsamt størri tørvur á proteinum. - Landbúnaðurin hevur skjótt nátt markið fyri, hvussu nógv kann framleiðast. Genbroyttar rávørur er tí einasta loysnin, greiðir Wout Dekker, stjóri á Nutreco og eigari av altjóða fóðurfyritøkuni >>Skretting<<, frá. Fyri fáum árum síðani varð genbroytt soya ikki framleitt, men er nú 40 prosent av samlaðu framleiðsluni. Vinnuhúsið greiðir frá, at tað verður ein stór avbjóðing hjá alivinnuni og fóðurframleiðarunum at fyrireika brúkaran og hjálpa honum at skilja hesa støðuna.

# Krevja nýggja Ritu nú

**Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, hevur vegna staðbundnu nevndina í Nólsoy og kommununa sent skriv til Helenu Dam á Neystabø við áheitan um, at gera skjótt av, so nýtt nólsoyarskip kann setast í sigling í 2009**

NÓLSOYARSKIP

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ein sannroynd, at nólsoyingar eru vónbrotnir um, at arbeiðið við nýggjum nólsoyarskipi er steðgað upp. Tað hevur nú fingið staðbundnu nevndina í Nólsoy við borgarstjóranum sum føddum formanni, at taka til pennin.

Í skrivi, stílað til Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í samferðslumálum, verður víst á tað arbeiði, sum undanfarna samgonga setti í gongd, og eftir teirri tíðarætlanini skuldi útbjóðingartilfarið verið klárt um ársskiftið 2007/2008. Somuleiðis segði tíðarætlanin, at nýtt skip skuldi verið klárt at sett í sigling um miðan ella seinnapartin av 2009.

- Men nú er komið fram, at eingir pengar eru settir av til eitt nýtt skip í 2008, og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur Heðin Mortensen, sum vegna kommununa og staðbundnu Nólsoyarnevndina hevur sent bræv til Helenu Dam á Neystabø, har hann heitir á landsstýriskvinnuna um at bera so í bandi, at nýtt skip kann setast inn í siglingina til Nólsoyar í 2009, so sum upprunaliga ætlað.

Hann vísir í brævinum á, at Ritan ikki er nútíðar hóskandi, og at tað kemur fyri, at ógongd fólk mugu hivast umborð og í land við krananum, og tað er óvirðiligt fyri fólk og átti at verið óvirðiligt fyri løgting og landsstýri eisini.

- Alt forarbeiðið er gjørt. Skitsuprojekt er gjørt, og tí vilja vit gera vart við, at hetta ber ikki til. Samstundis sum landsstýrið tosar um Nólsoy sum ein oyggj, har dentur verður lagdur á ferðavinnu, hava vit eitt skip, sum als ikki er tíðarhóskandi, sigur Heðin Mortensen.

### Í langdrag

Borgarstjórin vísir á, at alt, sum skal flytast til Nólsoyar, má berast og dragsast. Alt má hivast og handast umborð og í land.



*- Eg vildi sæð tann tinglim, sum var hivaður umborð á eina ferju. Tað er lítið virðiligt og ikki at bjóða fólki í dag, sigur Heðin Mortensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Tað ber ikki til í dag, at ein bilur ikki kann koyra umborð og í land við tí tilfari, sum nú einaferð skal flytast til og av oynni, sigur Heðin Mortensen.

Hann fílist serliga á, at einasta stað, har illa gongd fólk kunnu vera umborð á Rituni, er eitt sjúkrahøli.

Men hesi fólk eru jú ikki sjúk. Tað er ómøguligt hjá fólki í koyristóli at koma niður í salongina, tí har eru vinkultrappur sum tú skal niður ígjøgnum. So tað er ikki hugsingur um at sleppa niður, um tú ikki ert fullførur, sigur Heðin Mortensen.

»Einir 40-50 nólsoyingar ferðast hvønn dag um fjørðin, og er hetta teirra farleið inn á meginlandið. Ein góð farleið við nútímans skipi hevði stuðlað undir, at fólk verða búgvandi í Nólsoy, og at tey ungu velja at búseta seg í Nólsoy«, skrivar Heðin Mortensen millum annað í brævinum til Helenu Dam á Neystabø.

Undanfarna landsstýri hevði fund úti í Nólsoy, har greitt varð frá gongdini í málinum. Eitt nú var skitsuprojekt lagt fram við skitsu av ætlaða skipinum, men nú er alt slept og málið púra steðgað upp.

At enda í brævinum sigur Heðin Mortensen:

»Staðbundna nevndin í Nólsoy heitir á landsstýrið um at bera skjótt at soleiðis, at nýtt skip verður sett inn á Nólsoyarfarleiðina í 2009«.

Hvat so víðari hendir í



*Fimm av teimum tólv sessunum skolaðu burtur í ódnarveðrinum í vár*

*Mynd: Rene Hansen*

# Nólsoyingar friða lundan

**Teir tríggir hagapartarnir í Nólsoy samdust um vikuskiftið um at friða lundan komandi tvey árini**

FRIÐING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í herviliga ódnarveðrinum í vár var uppgangurin so ógvusligur, at fimm av teimum tólv fleygingarsessunum á Urðini í Nólsoy skolaðu burtur.

Ivi hevur tí verið um, hvørt lundin fer at bera seg at sum vant, nú náttúran er so nógv broytt. Hetta, samstundis sum ógvuliga lítið hevur verið at fingið av lunda seinastu árini hevur gjørt, at tey trý hagastýrini í oynni hildu fund um vikuskiftið, og har blivu samd um at friða lundan komandi tvey árini.

Men hetta er tó bert galdandi fyri traditionellu sessirnar í Gomlu Urðini. Tað ber framvegis til at fleyga sær eitt kók í Nýggjurð ella á Hósmøl, sigur Rene Hansen, sum situr í Hagastýrinum fyri Heimaru Helvt, ið er størsti hagin í Nólsoy.

Hann er samstundis ein av royndu fleygamonnunum í oynni, og fylgir væl við, hvussu støðan hjá lundanum er.

Annars frættist, at óvanliga nógv hevur verið at sæð til lunda í ár aðrastaðni, so kanska árið í ár fer at roynast. Men óvanligu umstøðurnar í Nólsoy hava so ført til, at nólsoyingar hava valt at friða lundan tvey tey komandi árini.